Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Trivnaðarkanningar í sjúkrahúsverkinum

Spurningar:

1. Hvussu nógvir pengar eru settir av til komandi trivnaðarkanning í sjúkrahúsverkinum?
2. Um ikki ber til at svara neyvt, ber so til at koma við einum boði til nærmastu 100.000 kr. ella nærmastu 500.000 kr?
3. Hví verður tað mett neyðugt at gera trivnaðarkanning aftur nú, tá kanningar hava verið gjørdar í bæði í november 2022 og í oktober 2023?
4. Hvørji ítøkilig átøk eru framd eftir kanningina í 2022?
5. Hvørji ítøkilig átøk eru framd eftir kanningina í 2023?

Viðmerkingar:
Í miðlunum um dagarnar er upplýst, at sjúkrahúsverkið hevur í hyggju at gera stóra trivnaðarkanning av økinum. Í miðlum er eisini staðfest, at trivnaðarkanningar í øllum førum eru gjørdar av pørtum av sjúkrahúsverkinum bæði í 2022 og 2023.

Slíkar kanningar verða fíggjaðar av løgtingsfíggjarlógini, og tí verður spurt um hesa raðfesting innan sjúkrahúsverkið.

Á Løgtingi, 15. apríl 2024

Eirikur í Jákupsstovu